# Í fótasporum hjá forfedrunum

**Í Fótbúna í Havn hevur 3. ættarlið tikið við, og gingið verður sostatt í fótasporum hjá teimum, ið undan fóru. Handilin er kendur skóhandil, og hevur hann søgu aftur til 1955**



*Fótbúni leggur seg eftir at hava góðsku og ávís merkir. Eisini er eitt eyðkenni, at tænastan er í hásæti*

Tann 1. september tók nýtt ættarlið við í Fótbúna í Havn, har tey hava selt skógvar síðani 1955.

Harvið er tað 3. ættarlið, sum nú slóðar fyri.

Fyrstur í røðini var Karl Joensen, ættaður av Eiði.

Hann lærdi til skómakara í Klaksvík. Fór síðani til Havnar og fór undir ymiskt, m.a. at starvast sum skómakari. Tað var ikki beinanvegin, at Karl fór undir sjálvstøðugan handil. Meira um hesa søguna kann lesast í Sosialinum frá 5. september 2008, har Óli Jacobsen skrivar søguna.

Men skal skjótt takast samanum søguliga, so byrjaði alt við Villingardalsvegin, ið lá nakað fjarskotin tá. Seinni flutti Carl skósmiðjuna oman í Niels Finsensgøtu. Í 1955 flutti Karl Joensen oman í húsini á horninum Tróndargøta, Dr. Jacobsensgøta. Og har er Fótbúni enn.

Betri tíðir gjørdu, at heldur enn at umvæla, so keyptu fólk nýtt og loysti hetta seg eisini eins væl. Sum fráleið datt skómakarayrkið alt meira burtur, og uppgávan gjørdist meira at selja skógvar.

### Ætt eftir ætt

Eftir Karl tók dótturin Marjun við. Og nú hon hevur lagt frá sær, hevur sonur hennara, Bjarni, tikið við.

Bjarni lærdi í Keypsamtøkuni í Havn og arbeiddi so í 19 ár hjá Statoil, harav tey seinastu 9 í Danmark. Kona hansara Súsan, er fødd í Føroyum av donskum foreldrum.

Tey gjørdu av at flyta aftur til Føroya við børnunum Silas og Barbaru.

### Fólk vitja aftur

Bjarni sigur, at í Fótbúna leggja tey dent á hava gott og breitt úrval av skóm.

Av tí, at hetta er gamal handil, so vitja fólk aftur, og vit hava fleiri fastar kundar, sigur Bjarni.

Fótbúni leggur seg eftir at hava góðsku og ávís merkir. Eisini er eitt eyðkenni, at tænastan er í hásæti.

Og nú jól eru í hondum, er handilin sjálvandi á tremur við tí nýggjasta, so ongin fer til fánýtis í Fótbúna.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

**Meira um hesa søguna kann lesast í Sosialinum frá 5. september 2008, har Óli Jacobsen skrivar søguna.**










